

# SUÐUROYGGIN OG FRAMTÍÐIN

TILMÆLIÐ UM MENNINGARÁTØK 2018

## MENNINGARÁTØK Í SUÐUROY

Í áratíggju hevur Suðuroynni verið merkt av avbjóðingum og niðurgongd, tá samanborið verður við gongdina í restini av landinum. Fyri at broyta verandi gongd, hava kommunurnar í Suðuroynni við árslok í 2017 í felag tikið stig til, saman við Landinum, at skipa og skapa menningarátøk í Suðuroynni.

# Innihaldsyvirlit


1. MENNING Í ÚTJAÐARAØKJUM ....... 4
   Lívsleiðin hjá okkara ungu ....... 4
2. GONGDIN Í FÓLKATALINUM Í SUÐUROYNNI ....... 6
   Minkandi fólkatal ....... 6
   Skeiklað fólkatalssamanseting ....... 7
   Haldføristrupulleikin veruligur í Suðuroynni ....... 10
   Alarmerandi støða, sum ongin tekur í álvara! ....... 12
3. INNTØKUR OG VINNUMØGULEIKAR ....... 13
   Hægsta arbeiðsloysi í landinum ....... 13
   Lítlan vøkstur í lønargjaldinginum ....... 14
   Lágar tøkar inntøkur ....... 16
   Kommunurnar í Suðuroynni ....... 17
   Samanumtikið ....... 21
4. ELDRAØKIÐ ....... 22
5. MENNINGARÁTØK ....... 25
6. FLEIRI SKÚLATILBOÐ Í SUÐUROYNNI ....... 26
   Tilmælið 1. Seta á stovn pedagoghjálpara útbúgving við Heilsuskúla Føroya ....... 27
   Tilmælið 2. Byggja næmingaheim við Skúladepilin í Suðuroy ....... 27
   Tilmælið 3. Víðkan av virkseminum á Ítróttaháskúlanum í Suðuroy ....... 28
   Tilmællið 4. Stovna eftirskúla í norðaru helvt í Suðuroy ....... 29
   Tilmælið 5. Útnorður skúlin staðsetast í Hvalba ....... 30
   Tilmælið 6. Halda fast í teimum útbúgvingartilboðum sum eru ....... 31
7. SUÐUROYGGIN SUM FERÐAVINNUOYGGJ ....... 32
   Tilmælið 7. Víkingaskipið ....... 33
8. FERÐASAMBANDIÐ TIL SUÐUROYAR ....... 34
   Tilmælið 8: Suðuroyartunnilin projekterast ....... 35
   Tilmælið 9: Smyril og Suðuroyarleiðin ....... 35
   Tilmælið 10: Økja um tyrluflúgvingina ....... 36
   Tilmælið 11: Taka uppaftur sigling til Skotlands ....... 37
9. VINNUMENNING og KARMAR ....... 38
10. ONNUR VIÐURSKIFTI ....... 40
   Umstøðurnar hjá barnakonum ....... 40
11. AT ENDA ....... 41

## Talvur og myndir

TALVA 1. FÓLKATALIÐ Í SUÐUROYNNI 1950 – 2018. ........ 6
TALVA 2. TIL- OG FRÁFLYTING Í SUÐUROYNNI 1985 – 2017. ........ 7
TALVA 3. BØRN FØDD Í SUÐUROYNNI 1985-2017 ........ 8
TALVA 4. UNG OG PENSJÓNISTAR Í SUÐUROYNNI OG Í FØROYUM 1985-2018. ........ 9
TALVA 5. KVINNUR Í BURÐARFØRUM ALDRI OG PENSJÓNISTAR Í SUÐUROYNNI OG Í FØROYUM 1985-2018. ........ 9
TALVA 6. UNDIR 40 ÁR OG 40 ÁR OG ELDRI Í SUÐUROYNNI OG Í FØROYUM 1985-2018. ........ 10
TALVA 7. UNDIR 40 ÁR OG 40 ÁR OG ELDRI Í SUÐUROYNNI OG Í FØROYUM 1985-2018. ........ 11
TALVA 8. FULLTÍÐARARBEIÐSLOYSI Í % MARS 2017 OG MARS 2018. ........ 13
TALVA 9. FULLTÍÐARARBEIÐSLOYSI Í SÝSLUNUM MÁNAÐARLIGA 2015-2018. ........ 14
TALVA 10. LØNARGJALDINGAR BÝTT Á ØKIR 2010-2017. ........ 15
TALVA 11. LØNARGJALDINGAR Í MUN TIL FÓLKATAL Í 2017. ........ 16
TALVA 11. TØKA INNTØKAN HJÁ FÓLKI Í SÝSLUNUM Í 2015 ........ 16
TALVA 12. TØKA INNTØKAN HJÁ FÓLKI Í SÝSLUNUM Í 2015 ........ 17
TALVA 13. PERSÓNSSKATTA INNTØKUR PR. PERSÓN Í ÚTVALDUM KOMMUNUM 2010-2017 ........ 18
TALVA 14. FYRIBILSSKATTUR HJÁ KOMMUNUNUM Í 2016 OG Í 2017. ........ 19
TALVA 15. SAMANBERING AV PERSÓNSSKATTAINNTØKUNUM HJÁ ÚTVALDUM KOMMUNUM. ........ 20
TALVA 16. PARTAFELAGSSKATTURIN PR. PERSÓN HJÁ ÚTVALDUM KOMMUNUM 2010-2016. ........ 21
TALVA 17. LUTFALLIÐ AV FÓLKI, SUM ERU 67 ÁR OG ELDRI Í ØKJUM Í LANDINUM 1985-2018. ........ 22
TALVA 18. FÍGGJARÆTLANIN HJÁ BÚ- OG HEIMATÆNASTUNI Í SUÐUROY FYRI 2018 OG ÁVIRKAN Á EINSTØKU KOMMUNURNAR ........ 24

# SUÐUROYGGIN OG FRAMTÍÐIN

## TILMÆLIÐ TIL LØGMANN OG LANDSSTÝRIÐ UM MENNINGARÁTØK SUÐUROYNNI AT FRAMA

18. januar 2018 vóru kommunurnar í Suðuroynni á fundi við løgmann og landsstýrið í Tinganesi. Endamálið við fundinum var at varpa ljós á støðuna í Suðuroynni, sum hevur serligar avbjóðingar orsaka av m.ø.

- minkandi fólkatalið
- skeiklaðum aldurs- og kyndbýti
- arbeiðsloysi
- lágum vinnuligum virksemi
- lágum inntøkum hjá fólki í Suðuroynni
- lítlum vøkstri í kommunalum inntøkum, tá samanbori verður við restina av landinum
- vaksandi útreiðslur á eldraøkinum

Á fundinum við løgmann og landsstýrið varð gjørt av, at landsstýrið og kommunurnar skuldu taka hendan álvarsspurning upp og møtast aftur á fundi í apríl/mai 2018.

Á fundinum við landsstýrið 18. januar 2018 mæltu kommunurnar til, at uppskotini til menningarátøk í Suðuroynni skuldu býtast í:

- átøk, sum verða framd av kommununum í Suðuroynni,
- átøk, sum verða framd í samstarvi millum kommunurnar í Suðuroynni og Landið,
- og átøk, sum verða framd av Landinum.

Í tíðarskeiðinum frá februar til mai 2018 hava kommunustýrini í Suðuroynni arbeitt í felag við at gera tilmælið til løgmann og landsstýrið um menningarátøk Suðuroynni at frama.

Arbeiðið hevur verið skipað á tann hátt, at allir kommunustýrislimir hava kunnað luttikið á felags fundum, umframt at starvsfólk í kommunalum umsitingum eisini hava verið við. Fundirnar hava eisini fevnt um luttøku av innbodnum, sum hava havt framløgur um ávís evnir. Umframt felags fundir hevur eisini verið arbeitt í bólkum.

Kommunustýrislimir hava verið knýttir at einum forumi á internetinum, har tilfar, fundarfrágreiðingar o.a. hevur verið lagt út til allar limir at lesa og viðmerkja.

Hetta uppritið er upprit frá ávegis arbeiðinum frá fundum millum kommunustýrini, har nøkur av átøkunum verða greinaði. Arbeitt verður framhaldandi við øðrum viðurskiftum og átøkum, sum hava til endamáls at skapa framburð og menning í Suðuroynni.

28. mai 2018

*Borgarstjórarnir í kommununum í Suðuroynni*

# 1. MENNING Í ÚTJAÐARAØKJUM

Grundarlagið fyri at skapa menning og framburð í útjaðaranum er tengt at fleiri ymiskum viðurskiftum. Ein týðandi partur er atgongd til arbeiði. Ein partur fevnir um atgongd til trivnaðartænastur og -tilboð, og atgongd til mentanar- og útbúgvingartilboð í nærumhvørvinum. Ein annar partur fevnir um at atgongd til meginøkið og út í heim.

Útjaðaraøkir, sum hava megnað at skapt menning, bera m.a. eyðkenni av:

- einum fjøltáttaðum arbeiðsmarknaði við ymiskum sløgum av arbeiðsplássum og arbeiðsmøguleikum, og ikki minst arbeiðsmøguleikum hjá fólki við útbúgving
- atgongd til góðar trivnaðartænastur og -tilboð í nærumhvørvinum, bæði av almennum og privatum slagi, og til allar aldursbólkar
- atgongd til spennandi og mennandi mentanartilboð í nærumhvørvinum
- atgongd til spennandi og mennandi útbúgvingartilboð í nærumhvørvinum
- góð atgongd til meginøkið hevur eisini stóran týdning, ikki minst í tann mun, at atgongdin er tengd at atgongd til góðan arbeiðsmarknað

Í arbeiðinum við menningarátøkum Suðuroynni hava omanfyrinevndu viðurskifti eisini hava týðandi leiklut.

## Lívsleiðin hjá okkara ungu

Lívsleiðin hjá okkara ungu hevur tey seinastu 3-4 ártíggjuni verið merkt av, at okkara ungu verða eggjaði til at nema sær útbúgving. Og staðfestast kann, at tey flestu ungu eftir fólkaskúla fara á miðnámsskúla og síðani fara at nema sær eina førleikagevandi hægri útbúgving. Hetta er lívsleiðin hjá ungum í Suðuroynni, eins og í restina av landinum.


Fólkaskúla


Miðnámsskúla


Hægri útbúgving

Fyri ung í Suðuroynni merkir hetta, at tey í allar flestu førum skulu flyta úr Suðuroynni í longri áramál, frá 3-4 ár til 6-7 ár, og í flestu førum av landinum. Hóast nógv hava ein dreym um at flyta aftur til Suðuroynna, so er ein av høvuðstrupulleikunum, at tað eru ov fá størv til útbúgvin fólk leys at søkja í Suðuroynni. Av somu orsøk enda tey flestu eftir lokna útbúgving í miðstaðarøkinum, og heilir árgangir verða á hendan hátt "burturi" í Suðuroynni.

Ávirkanin av hesum veruleika gerst eisini alsamt sjónligari, tá hugt verður eftir støðuni í Suðuroynni, ikki minst tá hugt verður at fólkatalinum. Og tað er meiri átroðkandi enn nakrantíð fyrr, at átøk og tiltøk verða sett í verk, sum kunnu broyta gongdin í Suðuroynni.

# 2. GONGDIN Í FÓLKATALINUM Í SUÐUROYNNI

Gongdin í Suðuroynni hevur seinastu ártíggjuni verið skeiva vegin. Fólkatalið er minkað og alders- og kynssamansetingin er skeiklað. Arbeiðsloysið er væl hægri enn í landinum sum heild. Vinnuliga virksemi er lægri enn í landinum sum heild. Inntøkurnar hjá lønttakarum eru lágar, samanborið við inntøkurnar hjá fólki í øðrum pørtum av landinum. Kommunurnar hava eisini væl lægri inntøkur frá persónsskatti og partafelagsskatti enn kommunur aðrastaðni í landinum.

Støðan í Suðuroynni er tískil sera álvarsom og avbjóðandi, og staðfestast kann, at broytist gongdin ikki, so er stórur vandi fyri, at Suðuroyggin gerst eitt økið, sum fer at fáa stórar trupulleikar, tá umræður at bjóða góðar tænastur til borgarar og vinnulív, og gera íløgur í nýggj tilboð og nýggjar karmar, borgarum og vinnulívinum at frama. -Og av somu orsøk fer at gerast eitt økið, sum er lítið áhugavert at búgva í.

## Minkandi fólkatal

Fólkatalið í Suðuroynni er minkað støðugt seinastu nógvu ártíggjuni. Í 1970árunum var eitt tíðarskeið, har fólkatalið vaks, men annars er fólkatalið í Suðuroynni minkað at kalla út í eitt frá 1980 (við undantøku av 2-3 árum) til dagin í dag.




**Talva 1. Fólkatalið í Suðuroynni 1950 – 2018.**

Høvuðsorsøkin til skeivu gongdina í fólkatalinum er fráflyting og lágt ella negativt burðaravlop. Tey yngru ættarliðini flyta – serliga fyri at nema sær útbúgving – og bert fá flyta aftur til Suðuroynna, tí tey hava ikki møguleika at fáa størv her.




**Talva 2. Til- og fráflyting í Suðuroynni 1985 – 2017.**

## Skeiklað fólkatalssamanseting

Áhaldandi minking í fólkatalinum hevur eisini havt stóra ávirkan á fólkatals samansetingina í Suðuroynni, sum er vorðin skeiklað.

Talið av børnum, sum verða fødd, minkar í hvørjum. Í 2017 vórðu 40 børn fødd í Suðuroynni, og fyrsta árfjórðing 2018 vórðu 9 børn fødd í Suðuroynni.

Heldur hendan gongdin áfram, so fer tað innan stutta tíð at hava stóra ávirkan á alt dagstovnaøkið í Suðuroynni og á fólkaskúlar í Suðuroynni. Virksemi á hesum økjum er jú neyvt tengt at barnatalinum. Eitt minkandi barnatal merkir at tað verða færri størv á dagstovnaøkinum og í fólkaskúlunum, og her er talan serliga um størv, sum eru mannaði av kvinnum.




**Talva 3. Børn fødd í Suðuroynni 1985-2017**

---

***MINKANDI BARNATAL !***
***Verður gjørd ein einføld framskriving av barnatalinum í Suðuroynni, grundað á gongdina seinastu 7-8 árini, so bendir á, at tað í 2025 verða fødd umleið 30 børn í Suðuroynni.***

***Verður framrokningin førd út á árgangirnar, so er líkt til, at talið av børnum, sum eru í dagstovnaaldri (6 árgangir undir skúlaaldur) minkar við einari helvt fram til 2025 – frá umleið 400 børnum í dag til umleið 200 børn í 2025.***

***Verður framrokningin førd út á fólkaskúlarnar, so bendir eisini á, at talið av skúlanæmingum fer at minkað nógv – úr góðum 590 næmingum í dag til umleið 350 næmingar í 2025.***

***Greitt er, at hetta fer at fáa stóra neiliga ávirkan á tørvin á starvsfólki innan dagstovna- og skúlaøkið í Suðuroynni. Hetta fer eisini at hava stóra neiliga ávirkan á nógv onnur økir, ikki minst á alt ítróttar- og frítíðarlívið í Suðuroynni.***

---

Gongdin í fólkatalinum hevur eisini havt stóra ávirkan á aldurssamansetingina í Suðuroynni. Gongdin í talinum av ungum 15 ár og yngri, í mun til talið av pensjónistum (67 ár og eldri), gevur eina greiða fatan av gongdini. Talið av pensjónistum veksur skjótt, meðan talið av ungum minkar skjótt, eins og víst í talvuni niðanfyri.




**Talva 4. Ung og pensjónistar í Suðuroynni og í Føroyum 1985-2018.**

Somu viðurskifti eru galdandi fyri lutfallið millum kvinnur í burðarførum aldri (tvs. í aldrinum 15 til 49 ár). Talið av kvinnum í burðarførum aldri er minkað líðandi bæði í Suðuroynni og í Føroyum. Í Suðuroynni er minking tó væl skjótari enn í Føroyum sum heild.




**Talva 5. Kvinnur í burðarførum aldri og pensjónistar í Suðuroynni og í Føroyum 1985-2018.**

Verður hugt eftir talinum av kvinnum í burðarførum aldri í mun til talið av pensjónistum, so hava tað Í Suðuroynni hava tað síðani 2016 verið fleiri pensjónistar í Suðuroynni enn kvinnur í burðarførum aldri.

Gongdin í Suðuroynni er framhaldandi skeiva vegin, meðan tilflytingin til Føroyar seinastu árini hevur eina jaliga ávirkan á gongdina í landinum sum heild, og tykist gongdin verða steðga í mun til fyri nøkrum árum síðani.

Minkandi tal av kvinnum í burðarførum aldri hevur eina beinleiðis ávirkan á talið av børnum, sum verða følld í Suðuroynni – og eina skeiklaða aldurssamanseting.

## Haldføristrupulleikin veruligur í Suðuroynni

Onki bendur á, at gongdin í Suðuroynni fer at broytast! Sannlíkt er hinvegin, at gongdin fer at halda áfram.

Lutfallið millum fólk undir 40 ár og 40 ár og eldri gevur eina greiða ábending um hetta. Í Suðuroynni gerast vit eldri og eldri hvørt ár!




**Talva 6. Undir 40 ár og 40 ár og eldri í Suðuroynni og í Føroyum 1985-2018.**

Frá at Suðuroyggin eins og restin av Føroyum í 1980unum hevði eina "sunna balansu" millum yngru og eldri ættarliðini, so gongur tað skjótt skeiva vegin í Suðuroynni. Í 2008 "koppaði" kurvan og tað blivu fleiri í aldursbólkinum 40 ár og eldri, enn í aldursbólkinum undir 40 ár. Í Føroyum sum heild eru tað framhaldandi fleiri í aldursbólkinum undir 40 ár enn 40 ár og eldri.

Eins og víst í talvu 6, so gongur skjótt skeiva vegin í Suðuroynni. Kurvarnar fyri tey, sum eru 40 ár og eldri, og tey sum eru undir 40 ár, ganga skjótt hvør sín veg. Verður gjørd framskriving av hesum, so er púra greitt, at Suðuroyggin innan heilt fá ár fer at fáa ein sera álvarsaman haldføristrupulleika – um ikki ein broyting fer fram!

Búskaparráðið, Hagstova Føroya, Skattanevndin, Kommunufelagið og Landsstýrið hava øll víst á, at Føroyar við tíðini fara at fáa avbjóðingar við haldførinum – í stuttum, at tað eru ov fáir persónar í arbeiðsførum aldri (16-66 ár) í mun til talið av pensjónistum (67 ár og eldri). - Og merkir hetta, at tað eru lutfalsliga fá at bera útreiðslurnar, sum tað kostar at reka føroyska vælferðarsamfelagið.

Búskaparráðið hevur víst á, at í 2035 fara Føroyar at hava stórar avbjóðingar, tí framskrivingar vísa, at tað tá "bara" verða 2,6 fólk í arbeiðsførum aldri, og hetta fer at skapa trupulleikar, tí ov fáir skattgjaldarar eru til at halda almennu útreiðslurnar.

Gongdin í Suðuroynni seinastu árini, har talið av fólki í arbeiðsførum aldri í mun til talið av pensjónistum hevur gingið skeiva vegin, er longu álvarsom. Í 2018 vóru tað 3,1 fólk í arbeiðsførum aldri pr. pensjónist.




**Talva 7. Undir 40 ár og 40 ár og eldri í Suðuroynni og í Føroyum 1985-2018.**

Verður hugt at talinum av føddum børnum, talinum av ungum og eftir talinum av miðaldrandi og eldri í Suðuroynni, so er tað als onki, sum bendir á, at gongdin fer at broytast.

Haldføristrupulleikin, sum fer at raka Føroyar í 2035, rakar Suðuroynna áðrenn 2025 !

## Alarmerandi støða, sum ongin tekur í álvara!

Støðan í Suðuroynni, tá umrøður fólkatal og skeikladu aldurs- og kyns samansetingina, er onki nýtt. Seinastu 20 árini er aftur og aftur víst á, at gongdin í Suðuroynni er alarmerandi.

Økismenningarálit er skrivað. Fleiri felags fundir, nærmast kreppufundir, hava verið í Suðuroynni, har skiftandi landsstýrið eisini hava luttikið við lovorðum um at teirra partur skal ikki liggja eftir.

Í Suðuroynni hevur verið roynt at arbeiða við loysnum, bæði á vinnuliga økinum og frá kommunalari síðu. Men kann bara staðfestast, at tað gjøgnum árini í ov lítlan mun hevur borið til at fingið landsmyndugleikarnir at verið viðspælarar.

Støðan er alarmerandi og má takast í størsta álvara – og í nógv størri álvara enn higartil – bæði í Suðuroynni og í landsstýrinum.

# 3. INNTØKUR OG VINNUMØGULEIKAR

Gongdin í føroyska samfelagnum seinastu árini hevur verið merkt av stórum búskaparvøkstri, metstórum inntøkum hjá landi, kommunum, fyritøkum og fólki; lágum arbeiðsloysi og mangul uppá arbeiðsmegi í ávísum vinnugreinum.

Men hetta hevur ikki verið gongdin í Suðuroynni, sum í lítlan mun hevur fingið lut í teimum framúr góðu tíðunum í Føroyum seinastu árini.

## Hægsta arbeiðsloysi í landinum

Í flestu økjunum í landinum hevur tað tey seinastu árini at kalla ikki verið nakað arbeiðsloysi. Suðuroyggin skilur seg tó burturúr við nógv tí størsta arbeiðsloysinum í landinum.

Sambært tølunum frá Hagstovu Føroya fyri mars 2018 var arbeiðsloysi í Suðuroynni 5%, ein hækking á 0,8% í mun til somu tíð í 2017.

Øll hini økini hava sera lágt arbeiðsloysi. Minst er tað í Norðstreymi og Norðoya sýslu við 1,5%, Vága sýslu við 1,6% og Sandoyar sýslu við 1,8%. Í Eysturoyar sýslu er arbeiðsloysi við 2,2% og Suðurstreym við 2,5%.

Í Suðuroynni, eins og í flestu øðrum økjum í landinum, er arbeiðsloysið munandi hægri hjá kvinnum enn hjá monnunum, 5,6% hjá kvinnum og 4,6% hjá monnum.

Arbeiðsloysi í Suðuroynni øll tey seinastu árini hevur verið væl hægri enn í Landinum sum heild.




**Talva 8. Fulltíðararbeiðsloysi í % mars 2017 og mars 2018.**




**Talva 9. Fulltíðararbeiðsloysi í sýslunum mánaðarliga 2015-2018.**

Talvurnar omanfyri staðfesta, at meðan arbeiðsloysið sum heild er sera lágt, so er arbeiðsloysið í Suðuroynni fleiri ferðir hægri enn í øðrum pørtum av landinum.

## Lítlan vøkstur í lønargjaldinginum

Verður hugt eftir lønargjaldingum býtt á økir í landinum, so er myndin hin sama. Syðstu partnarin av landinum, Suðuroyar og Sandoyar sýsla, hava lítlan vøkstur tá samanborið verður við hinar sýslurnar.

Vøksturin í lønargjaldingum í tíðarskeiðnum frá 2010 til 2017 var fyri alt landið 32%. Tað eru serliga Norðoyggjar (49%), Eysturoy (37%) og Vágar (33%) sum hava havt vøkstur, meðan Norðstreymoy (26%) og Suðurstreymoy (25%) hava minni vøkstur. Suðuroy (21%) og Sandoy (16%) skilja seg burturúr.




| | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðoyar | 736.966 | 787.176 | 816.053 | 830.103 | 866.283 | 951.316 | 1.028.221 | 1.095.584 |
| Eysturoy | 1.454.484 | 1.476.244 | 1.544.878 | 1.544.013 | 1.652.279 | 1.761.204 | 1.870.899 | 1.985.564 |
| N-Streymoy | 515.092 | 507.701 | 518.395 | 527.985 | 553.352 | 585.121 | 621.498 | 650.348 |
| S-Streymoy | 2.881.451 | 2.861.917 | 2.939.846 | 2.994.618 | 3.107.103 | 3.256.276 | 3.419.338 | 3.603.779 |
| Vágar | 385.567 | 390.233 | 391.368 | 403.237 | 430.456 | 457.231 | 485.559 | 512.226 |
| Sandoy | 145.057 | 140.947 | 141.408 | 133.347 | 136.332 | 149.113 | 157.961 | 167.999 |
| Suðuroy | 515.246 | 508.266 | 536.292 | 546.996 | 575.878 | 595.564 | 614.759 | 624.261 |

**Talva 10. Lønargjaldingar býtt á økir 2010-2017.**

Verður hugt eftir lønargjaldingunum í mun til fólkatalið í økjunum, so er myndin hin sama. Í mun til fólkatalið, so "eigur" syðsti partur av landinum lutfalsliga lítlan part av lønargjaldingunum í 2017.




**Talva 11. Lønargjaldingar í mun til fólkatal í 2017.**

## Lágar tøkar inntøkur

Verður hugt eftir tøku inntøkunum hjá fólki í sýslunum í landinum, so er eisini greitt, at í Suðuroyar og Sandoyar sýslu vóru tað í 2015 lutfalsliga nógv, sum høvdu eina lága tøka inntøku, undir 200.000 kr, meðan tað vóru lutfalsliga fá sum høvdu miðal- og høgar tøkar inntøkur.




**Talva 11. Tøka inntøkan hjá fólki í sýslunum í 2015**

| Tøk inntøka | Alt Landið | Norðoya sýsla | Eysturoyar sýsla | Norður Streymoy | Suður Streymoy | Vágs sýsla | Sandoyar sýsla | Suðuroyar sýsla |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 0-200 tús. kr. | 63,6% | 67,0% | 65,5% | 65,4% | 58,3% | 65,8% | 71,9% | 71,4% |
| 200-300 tús. kr. | 21,7% | 18,2% | 20,6% | 22,0% | 25,2% | 19,8% | 16,6% | 17,1% |
| 300-400 tús. kr. | 7,7% | 6,3% | 7,4% | 6,7% | 9,4% | 6,5% | 5,5% | 5,4% |
| 400-500 tús. kr. | 3,0% | 3,0% | 3,0% | 2,6% | 3,2% | 3,1% | 2,7% | 3,1% |
| 501-600 tús. kr. | 1,7% | 2,2% | 1,3% | 1,5% | 1,8% | 1,8% | 1,7% | 1,5% |
| 601- tús. Kr. | 2,2% | 3,4% | 2,2% | 1,7% | 2,1% | 2,9% | 1,7% | 1,6% |
| Tilsamans | 100,0% | 100,0% | 100,0% | 100,0% | 100,0% | 100,0% | 100,0% | 100,0% |

**Talva 12. Tøka inntøkan hjá fólki í sýslunum í 2015**

## Kommunurnar í Suðuroynni

Gongdin í Suðuroynni – við minkandi fólkatalið, arbeiðs- og vinnuloysi, og lágum inntøkum – sæst sjálvsagt eisini aftur í inntøkunum hjá kommununum í Suðuroynni, bæði í persónsskattinum og í partafelagsskattinum.

Ikki minst tá samanborið verður við onnur økið í landinum, sum hava verið merkt av sera stórari búskaparligari framgongd seinastu 7-8 árini, gerst gongdin í Suðuroynni sjónlig.




**Talva 13. Persónsskatta inntøkur pr. persón í útvaldum kommunum 2010-2017**

Legg til merkis, at tað er í talvuni omanfyri ikki er tikið hædd fyri, at skattaprosentið í kommununum er ymiskt. Var skattaprosentið "javnstillað", so hevði tað verið uppaftur størri munur á støðuni, tí skattaprosentið hjá stóru kommununum í Suðuroynni (Tvøroyrar og Vágs kommunu) er millum hægstu í landinum![1]

Verður Suðuroyggin samanborin við onnur økir í landinum, so ber til dømis at samanbera við Runavíkar kommunu. Í Suðuroynni búðu tað í 2017 umleið 800 fólk fleiri enn tað búðu í Runavíkar kommunu. Suðuroyggin fekk í 2017 tilsamans 149,2 mió. kr. í persónsskatti, men hóast 800 fólk færri í Runavíkar kommunu var persónsskatturin í Runavíkar kommunu 151,6 mió. kr. ella 2 mió. kr. hægri enn í Suðuroynni.

[1] Miðal kommunuskattaprosentið í Føroyum er 20,24. Kommunuskattaprosentið í Vágs kommunu er 21,95% og í Tvøroyrar kommunu 21,90%.

Vóru persónsskatta inntøkurnar í Suðuroynni tær somu sum landsmiðal, so fingu kommunurnar í Suðuroynni tilsamans umleið 18,5 mió. kr. meiri í persónsskatti í 2017 enn staðfest varð.

Gongdin í persónsskattainntøkunum í Suðuroynni bendir á, at Suðuroyggin ikki fær nakran lut í vøkstrinum í samfelagnum, til dømis sæst hetta aftur í árunum 2016 og 2017.

**Fyribilsskattur fyri januar og december - samanlagt:**

| **Kommuna:** | **2016** | **2017** | Munur kr. | Munur % |
|---|---|---|---|---|
| Fugloyar | 1.783.068 | 2.257.652 | 474.584 | 26,62 |
| Viðareiðis | 12.442.658 | 13.355.205 | 912.547 | 7,33 |
| Hvannasunds | 11.980.811 | 14.567.227 | 2.586.416 | 21,59 |
| Klaksvíkar | 181.015.013 | 194.145.347 | 13.130.334 | 7,25 |
| Kunoyar | 4.711.946 | 4.453.258 | -258.688 | -5,49 |
| Fuglafjarðar | 55.240.820 | 62.301.147 | 7.060.327 | 12,78 |
| Eystur | 80.149.995 | 84.258.847 | 4.108.852 | 5,13 |
| Nes | 39.676.778 | 44.475.136 | 4.798.358 | 12,09 |
| Runavíkar | 140.582.253 | 151.594.046 | 11.011.793 | 7,83 |
| Sjóvar | 30.589.477 | 33.843.164 | 3.253.687 | 10,64 |
| Eiðis | 19.734.037 | 21.633.130 | 1.899.093 | 9,62 |
| Sunda | 58.830.726 | 63.126.922 | 4.296.196 | 7,30 |
| Kvívíkar | 20.990.876 | 22.031.037 | 1.040.161 | 4,96 |
| Vestmanna | 40.716.689 | 43.722.591 | 3.005.902 | 7,38 |
| Vága | 69.754.305 | 74.540.350 | 4.786.045 | 6,86 |
| Sørvágs | 40.300.546 | 43.120.339 | 2.819.793 | 7,00 |
| Sands | 13.997.331 | 15.054.313 | 1.056.982 | 7,55 |
| Skopunar | 14.283.981 | 15.587.654 | 1.303.673 | 9,13 |
| Skálavíkar | 4.730.890 | 5.055.942 | 325.052 | 6,87 |
| Húsavíkar | 3.262.486 | 3.128.289 | -134.197 | -4,11 |
| Skúvoyar | 1.229.549 | 1.237.174 | 7.625 | 0,62 |
| Hvalbiar | 22.567.945 | 22.912.561 | 344.616 | 1,53 |
| Tvøroyrar | 57.404.150 | 59.090.089 | 1.685.939 | 2,94 |
| Fámjins | 2.717.765 | 2.595.473 | -122.292 | -4,50 |
| Hovs | 3.118.345 | 3.150.447 | 32.102 | 1,03 |
| Porkeris | 8.977.551 | 8.762.129 | -215.422 | -2,40 |
| Vágs | 42.416.052 | 43.129.424 | 713.372 | 1,68 |
| Sumbiar | 9.074.532 | 9.519.007 | 444.475 | 4,90 |
| Tórshavnar | 698.961.964 | 730.220.087 | 31.258.123 | 4,47 |
| | **1.691.242.539** | **1.792.867.987** | **101.625.448** | **6,01** |
| | | | | |
| Landsskattur | 1.388.977.455 | 1.438.865.676 | 49.888.221 | 3,59 |
| Kirkjuskattur | 53.391.025 | 55.789.616 | 2.398.591 | 4,49 |
| Eftirlønarsk. | 299.334.162 | 326.849.601 | 27.515.439 | 9,19 |

**Talva 14. Fyribilsskattur hjá kommununum í 2016 og í 2017.**

Vøksturin í persóns-skattainntøkum hjá kommununum í Føroyum samanlagt var 6,01% frá 2016 til 2017. Vøksturin hjá kommununum í Suðuroynni undir einum var tó bert 1,95%, og er hetta væl lægri enn vøksturin í lønarútgjaldingunum í landinum sum heild.

Verða inntøkurnar frá persónsskatti hjá ymisku kommununum í Suðuroynni í 2017 samanbornar við kommunur aðrastaðin í landinum, sum eru áleið somu støðd, so gerst myndin eisini púra greið.

Kommunurnar í Suðuroynni hava lágar persónsskattainntøkur samanborið við aðrar kommunur í landinum.

| **Samanbering av persónsskattainntøkunum hja kommunum í Suðuroynni og kommunum av sami støðd norðanfjørð** | | | |
|---|---|---|---|
| | | | |
| **Kommuna** | **Fólkatal** | **Persónsskatta inntøka** | **Skattaprosent** |
| **Tvøroyrar kommuna** | 1.726 | 59.090.089 | 21,90% |
| Sunda kommuna | 1.704 | 63.126.922 | 21,50% |
| Fuglafjarðar kommuna | 1.520 | 62.301.147 | 21,50% |
| | | | |
| **Vágs kommuna** | 1.356 | 43.129.424 | 21,95% |
| Vestmanna kommuna | 1.201 | 43.722.591 | 21,50% |
| Nes kommuna | 1.253 | 44.475.136 | 20,50% |
| | | | |
| **Hvalbiar kommuna** | 693 | 22.912.561 | 20,00% |
| Eiðis kommuna | 694 | 21.633.130 | 18,75% |
| | | | |
| **Sumbiar kommuna** | 351 | 9.519.007 | 19,00% |
| Viðareiðis kommuna | 355 | 13.355.205 | 21,00% |
| **Porkeris kommuna** | 314 | 8.762.129 | 20,75% |
| | | | |
| **Hovs kommuna** | 97 | 3.150.447 | 20,00% |
| **Fámjins kommuna** | 82 | 2.595.473 | 19,00% |
| Húsavikar kommuna | 116 | 3.128.289 | 21,00% |
| Fugloyar kommuna | 37 | 2.257.652 | 16,00% |

**Talva 15. Samanbering av persónsskattainntøkunum hjá útvaldum kommunum.**

Partafelagsskatturin gevur ábendingar um vinnuliga virksemi í einum øki. Meðan kommunur í nøkrum økjum í landinum hava verið merktar av óvanliga stórum vøkstri í inntøkum frá partafelagsskatti, so er hetta ikki støðan í Suðuroynni




**Talva 16. Partafelagsskatturin pr. persón hjá útvaldum kommunum 2010-2016.**

Um partafelagsskatturin hjá kommununum í Suðuroynni var á sama støði sum landsmiðal, so vóru partafelagsskatturin í 2016 umleið 6,5 mió. kr. hægri.

## Samanumtikið

Støðan í Suðuroynni er merkt av, at arbeiðsloysið er væl hægri enn í øðrum pørtum í landium. Vinnuliga virksemi er lægri enn aðrastaðni í landinum. Hesi viðurskifti ávirka inntøkuna hjá bæði fólki og kommununum.

Kommunalu inntøkurnar frá persóns- og partafelagsskatti eru í Suðuroynni væl lægri enn í øðrum pørtum av landinum. Kommunurnar í Suðuroynni skulu tó veita somu tænastur til borgarar og vinnulív, sum verður veitt í øðrum pørtum av landinum. Eisini á hesum økinum eru avbjóðingar.

# 4. ELDRAØKIÐ

1. januar 2015 yvirtóku kommunurnar eldraøkið, sum sambært lóg skuldi skipast í samstørv. Í Suðuroynni varð eldraøkið skipað í samstarvinum Bú- og Heimatænastan í Suðuroy.

Tá eldraøkið varð lagt til kommunurnar at umsita, varð serskipan gjørd fyri Sandoyar sýslu, m.a. orsaka av støddin (fólkatalinum) og lutfalsliga høga talinum av fólki í aldrinum 67 ár og eldri.

Verður hugt eftir lutfallinum av fólki, sum eru 67 ára og eldri í ymisku økjunum í landinum, so hevur í Suðuroynni verið ein stórur vøkstur í talinum av 67 ár og eldri seinastu árini. -Og er støðan í Suðuroynni í dag lík teirri, sum førdi við sær, at Sandoyar sýsla mátti hava serskipan, tá eldraøkið varð lagt til kommunurnar at umsita.




**Talva 17. Lutfallið av fólki, sum eru 67 ár og eldri í økjum í landinum 1985-2018.**

Tá eldraøkið varð lagt til kommunurnar at umsita, varð aftur og aftur av landsstýrinum víst á, at játtanin frá landi til kommunur til eldraøkið fór væl og virðiliga at dekka útreiðslurnar á eldraøkinum.

Víst varð á, á fundi við landsstýriskvinnuna í almannamálum í juni 2014, at ætlanin fyri Suðuroynni fór neyvan at halda, tí tað vóru nógvar útreiðslur á eldraøkinum, sum kommunrunar í Suðuroynni hildu, hóast eldraøkið í 2014 fult og heilt var ein landsuppgáva.

Kommunurnar í Suðuroynni eru av teirri heilt greiðu fatan,

- at fíggjarligu flytingarnar frá landi til kommunurnar í samband við eldraøkið skulu fíggjað eldraøkið
- og í teimum førum at fíggjarligu flytingarnar ikki hava strekt til, hava kommunurnar verið noyddar at finna eyka fígging frá øðrum inntøkum hjá kommununum til at fíggja eldraøkið

At rokna leigugjøld fyri eldrabústaðir, sum kommunur eiga, uppí inntøkurnar til eldraøkið er burtur úr vón og viti. Viðtøkurnar fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy, sum Landsstýrið hevur gjørt 16. juli í 2014 (!), staðfesta at avtala skal gerast um leigu av bygningum, soleiðis at ognarkommunurnar verða hildnar skaðaleysar.

Staðfestast kann at Fíggjarmálaráðið hevur grundleggjandi aðra fatan av veruleikanum enn kommunurnar í Suðuroynni. Við útgangsstøðið í flytingini frá land til kommunur og inngjaldinum frá kommununum til eldraøkið í Suðuroynni, staðfesta kommunurnar í Suðuroynni:

- at hallið av eldraøkinum í Suðuroynni í 2015 var góðar 2,3 mió. kr.
- at hallið av eldraøkinum í Suðuroynni í 2016 var góðar 2,7 mió. kr.
- at hallið av eldraøkinum í Suðuroynni í 2017 verður umleið 2,5 mió. kr.

Staðfestast kann eisini, at kommunurnar í Suðuroynni eru sera ymiskt raktar av hallinum á eldraøkinum. Hallið hjá einstøku kommununum er fíggjað við inntøkum frá m.ø. persónsskattinum hjá kommununum, sum annars undir vanligum umstøðum skal fíggja kommunalan rakstur og íløgur.

Sum kunnugt meta kommunurnar at støðan við stórum hallum á eldraøkinum ikki er haldbar, og av somu orsøk varð á fundi 18. januar 2018 heitt á landsstýrið um at virka við til loysn á eldraøkinum í Suðuroynni.

Fíggjarliga støðan á eldraøkinum í Suðuroynni hevur eisini ført við sær, at kommunurnar enn ikki hava samtykt eina fíggjarætlan fyri Bú- og Heimatænastuna fyri árið 2018. Útkast til fíggjarætlan er tó gjørt, har hædd er tikin fyri lønarhækking, nýggjum tilboði við dagtilhaldi í eldrasambýlinum við Sílánna (sum í løtuni ikki er partur av eldraøkinum í Suðuroynni), og lógarkravda vitjunartænastu til eldri borgarar.

Hetta uppskotið til fíggjarætlan javnvigar við 58,475 mió. kr., ella 7,6 mió. kr. meiri enn mett verður at kommunurnar fáa frá Landinum til at reka eldraøkið í 2018. Hetta merkir, at kommunurnar í Suðuroynni hvør sínum lagi skulu finna stórar upphæddir frá egnum persónsskatti fyri at fíggja raksturin á eldraøkinum.

Í talvuni niðanfyri verður víst, hvussu fíggjarætlanin hjá Bú- og Heimatænastuni í Suðuroy fyri 2018 ávirkar einstøku kommununar.

**Bú- og Heimatænastan í Suðuroy 2018**

| | Útgoldið frá landinum til kommunurnar | Gjald til fíggjarætlanina 2018 hjá BHS | Munur | |
|---|---|---|---|---|
| Hvalbiar kommuna | 7.425.000 | 8.522.150 | -1.097.150 | |
| Tvøroyrar kommuna | 17.943.000 | 19.928.660 | -1.985.660 | |
| Fámjins kommuna | 1.100.000 | 1.704.430 | -604.430 | * |
| Hovs kommuna | 1.034.000 | 1.311.100 | -277.100 | * |
| Porkeris kommuna | 3.323.000 | 4.195.520 | -872.520 | |
| Vágs kommuna | 15.600.000 | 17.568.740 | -1.968.740 | |
| Sumbiar kommuna | 4.436.000 | 5.244.400 | -808.400 | |
| **Tilsamans** | **50.861.000** | **58.475.000** | **-7.614.000** | |

*Eldri tøl fyri útgjaldi frá landinum til kommunurnar.

**Talva 18. Fíggjarætlanin hjá Bú- og Heimatænastuni í Suðuroy fyri 2018 og ávirkan á einstøku kommunurnar**

Støðan á eldraøkinum, har kommunur skulu fíggja raksturin av eldraøkinum við egnum persónsskatti er ikki ein serstøða fyri Suðuroynna. Høvuðsmunurin á Suðuroynni og øðrum pørtum í landinum er, at Suðuroyggin ikki hevur havt ein stóran vøkstur í persónsskattainntøkunum, eins og onnur økið hava, sum ger tað gjørligt at fíggja eldraøkið við persónsskattainntøkum.

Hetta er eisini høvuðsorsøkin til at kommunurnar í Suðuroynni hava tikið málið upp við løgmann og landsstýrið á fundi 18. januar 2018, tí neyðugt er at finna eina loyns.

Kommunurnar í Suðuroynni ynskja eina permanenta loysn á fíggjarliga partinum á eldraøkinum, soleiðis at arbeiðsfriður, stabilitetur og tryggleiki kann valda á eldraøkinum, borgarum og starvsfólki at frama. Og neyðugt er, at hendan loysnin verður framd skjótast tilber.

# 5. MENNINGARÁTØK

Á fundi við Landsstýrið 18. januar 2018 varð avtalað, at kommunurnar í Suðuroynni skuldi koma við uppskotum til menningarátøk í Suðuroynni.

Frá byrjan hevur verið umrøtt at koma við uppskotum um

- átøkum, sum verða framd av kommununum í Suðuroynni,
- átøkum, sum verða framd í samstarvi millum kommunurnar í Suðuroynni og Landið,
- og átøkum, sum verða framd av Landinum.

Grundhugsanin aftanfyri øll menningarátøkini er, at tey skulu hava til endamáls at skapa nýggj størv, ikki minst størv til útbúgvin fólk.

Hartil er dentur eisini lagdur á, at nøkur átøk skulu hava eina her-og-nú ávirkan, tvs. ávirkan upp á stutt sikt, meðan onnur átøk kunnu hava ávirkan á longri sikt, tvs. har ávirkanin av átøkunum skulu síggjast aftur innan nøkur ár.

Niðanfyri er ein gjøgnumgongd av átøkunum, sum hava verið umrødd á felags fundum millum allar kommunurstýrislimir í Suðuroynni í tíðarskeiðinum frá januar til mai 2018.





## 6. FLEIRI SKÚLATILBOÐ Í SUÐUROYNNI

Skúlatilboð skapa størv til útbúgving fólk, samstundis sum talan eisini er um tilboð til bæði borgarar í nærumhvørvinum og í landinum sum heild. Royndir úr Suðuroynni vísa eisini, at nýggj skúlatilboð hava havt stórar ávirkan og ringvirkningar í oynni.

Eitt dømi er Heilsuskúli Føroya, sum er staðsettur við Skúladepilin í Suðuroy. Heilsuskúlin hevur skapt fleiri størv til útbúgvin fólk og hevur harumframt eisini ført við sær, at stórt tal av næmingum hvørt ár leita til Suðuroyar at nema sær útbúgving. Hetta hevur ávirkan bæði á lívið á Skúladeplinum, bygdalív í Suðuroynni og hevur eisini ført við sær, at fleiri tilboð um útleigan eru komin í Suðuroynni, til frama fyri bæði næmingar á Skúladeplinum og ferðavinnuna.

Ítróttaháskúlin í Suðuroy er feskasta dømi um skúla í Føroyum, sum hevur havt stóra jaliga ávirkan á eitt økið. Við Ítróttaháskúlanum eru skapt fleiri spennandi størv í Suðuroynni – størv, sum hava drigið fólk við útbúgvingum og royndum til oynna. Lærarar á Ítróttaháskúlanum eru í stóran mun fluttir til Suðuroynna at arbeiða á skúlanum. Ítróttaháskúlin er hartil eitt nýtt spennandi tilboð, sum hvørt heyst og vár dregur ung úr øllum landinum og uttanlands til Suðuroyar á ítróttaskúla. Umframt at verða eitt nýtt arbeiðspláss og eitt nýtt skúlatilboð, so hevur Ítróttaháskúlin eisini verið við til at skapa eina meiri jaliga mynd av Suðuroynni sum heild.

Galdandi fyri bæði Heilsuskúla Føroya og Ítróttaháskúlan í Suðuroy er, at skúlarnir ikki hava hvat trupulleikar við at fáa fólk við útbúgving til størvini á skúlunum. Skúlatilboðini eru eisini somikið spennandi, at næmingar úr øllum heraðshornum leitað sær á skúlarnar.

Við fleiri skúlatilboðum í Suðuroynni, bæði nýggjum og víðkan av verandi tilboðum, er eisini grundarlag fyri at skapa enn fleiri størv og enn størri ringvirkningar í nærumhvørvinum.

## Tilmælið 1. Seta á stovn pedagoghjálpara útbúgving við Heilsuskúla Føroya

Í 2011 varð arbeitt við at fáa sett á stovn pedagoghjálpara útbúgvingin við Heilsuskúla Føroya. Pedagoghjálpara útbúgvingin er eins og heilsuhjálpara útbúgvingin ein "erhvervs-útbúgving". Í grannalondum okkara er siðvenja fyri, at hesar báðar útbúgvingar verða bodnar út á sama skúla, og er hetta eisini bakgrundin fyri uppskotinum frá 2011 um pedagoghjálpara útbúgving við Skúladepilin í Suðuroy.

Tað eru fleiri enn 1.000 fólk í pedagoghjálpara størvum í Føroyum, so eins og við heilsuhjálparaútbúgvingini, so er tørvur á hesari útbúgvingin fyri at førleikamenna starvsfólk á m.ø. dagstovnaøkinum. Við játtan til pedagoghjálpara útbúgvingina kunnu skapast 3-5 nýggj størv til fólk við útbúgvin verða við Skúladepilin í Suðuroy.

*Kommunurnar í Suðuroynni stuðla fult og heilt at farið verður undir at skipa hesa útbúgving við Skúladepilin í Suðuroy og bjóða næmingum at søkja á útbúgvingina við ársbyrjan 2019.*



## Tilmælið 2. Byggja næmingaheim við Skúladepilin í Suðuroy

Í álitinum um gagnnýtslu av Skúladeplinum í Suðuroy frá 2011 var eitt av tilmælinum at byggja eitt næmingaheim við Skúladepilin í Suðuroy.

Skotið varð upp at gera 11 búeindir við 4 íbúðum í hvørjari búeind. Hvør búeind var 144 m2 og hvør íbúð umleið 36 m2. Uppskotið fevndi eisini um, at ein búeind varð gjørd sum felagshús.

Í 2011 vórðu heintaði inn tilboð uppá byggingina, umframt at byggifrøðingur gjørdi metingar av ymiskum lutum í samband við byggingina. Mett var í 2011, at tær 11 eindir kundu byggjast fyri umleið 20 mió. kr.




Lagt var í álitinum um gagnnýtslu av Skúladeplinum í Suðuroy upp til, at Landið umvegis løgtingslógina um stuðul til bústaðarhús til fólk í útbúgving skuldi stuðla við 13 mió. kr. Restin skuldi fíggjast við lántøku og stuðli.

Raksturin verður fíggjaður við leiguinntøkum frá lesandi og frá ferðafólki um summarið.

*Við øktum virksemi á Skúladeplinum í Suðuroy gerst neyðugt at taka hesa verkætlan fram aftur og mælta kommunurnar í Suðuroynni til, at Land og kommunur í felag fara undir hesa verkætlan, og at ein arbeiðsbólkur umboðandi partarnar verður settur at gera uppskot til ítøkiliga loysn.*

## Tilmælið 3. Víðkan av virkseminum á Ítróttaháskúlanum í Suðuroy

Ítróttaháskúlin í Suðuroy er eitt nýtt spennandi skúlatilboð í Føroyum, sum byrjaði í august 2016. Ítróttaháskúlin hevur fingið eina framúr góða byrjan og áhugin fyri at sleppa á Ítróttaháskúla er sera stórur.

Verandi karmar geva pláss til umleið 40 næmingar. Til heystskeiðið 2018 vóru tað mitt í mai tilmeldaðir fleiri enn 80 næmingar, og sannlíkt er, at tað verða útvið 100 tilmeldingar, áðrenn umsóknarfreistin er úti 1. juli 2018.

Fyri at nøkta ómetaliga stóra tørvin, sum longu varð staðfestur í 2017, varð á vári í 2017 farið undir at fyrireika betran av kørmunum hjá Ítróttaháskúlanum. Avtalað er síðani gjørd við Bústaðir um bygging av næmingabústaði í Vági, sum rúmar upp til 72 næmingum. Byrjað verður í juni 2018 og n.æmingabústaðurin verður liðugur til skúlarársbyrjan á heystskeiðnum 2019.

Løgtingið hevur eisini játtað 0,8 mió. kr. í 2018 (við ætlan um somu játtan í 2019 og 2020) til at betra um karmarnir hjá Ítróttaháskúlanum. Hendan játtan verður brúkt til at byggja upp

ein nýggjan háskúla, tvs. ein bygning við skúlastovum, hølum til leiðslu, umsiting og lærarar. Skúlabygningurin verður klárur at taka í nýtslu við skúlabyrjan til heystskeiðið 2019.

Við nýggjum næmingabústaði og nýggjum skúlabygningin er gjørligt at økja um næmingatalið frá 40 til 72 næmingar. Leiðslan á Ítróttaháskúlanum hevur latið inn fíggjarætlan fyri 2019 og 2020 til Mentamálaráðið, sum er grundað á 72 næmingar.

*Kommunurnar í Suðuroynni taka undir við hesum og heita á Landið um at virka fyri hesari ætlan, sum fer at føra við sær, at fleiri størv til fólk við útbúgving og onnur størv verða løgd afturat verandi størvum á Ítróttaháskúlanum í Suðuroy.*




## Tilmælið 4. Stovna eftirskúla í norðaru helvt í Suðuroy

Í longri tíð hevur verið arbeitt við at seta á stovn eftirskúla í norðaru helvt í Suðuroy. Hetta hevur eisini verið á skrá hjá Landsstýrinum og er játtan sett av til endamálið á Fíggjarlógini.

Semja er í norðaru helvt í Suðuroy um at eftirskúlin skal staðsetast á Tvøroyri. Arbeiðsbólkur er eisini settur at arbeiða við eftirskúlaætlanini og arbeiðsbólkurin hevur biðið um fund við Mentamálaráðið um eftirskúlan í Suðuroy.

Arbeiðsbólkurin setur ígongd arbeiðið við kørmunum kring eftirskúlan og eisini við innihaldið í eftirskúlanum, sum verður í tráð við upprunaætlanina, sum fevnir um mentan, list og sjómansskap.

Ætlanin er at byrja virksemi á eftirskúlanum í august 2019.



Íløgujáttan og rakstrarjáttan til eftirskúlan ferð at føra við sær økt virksemi í Suðuroynni. Íløgujáttanin skapar virksemi í samband við at karmar skulu byggjast upp. Rakstrarjáttan til hetta nýggja skúlatilboðið førir við sær, at fleiri nýggj størv verða skapt í Suðuroynni.

*Kommunurnar í Suðuroynni taka undir við hesari ætlan, sum førir við sær, at fleiri størv til fólk við útbúgving og onnur størv verða Eftirskúlanum í Suðuroy.*

## Tilmælið 5. Útnorður skúlin staðsetast í Hvalba

Útnorðurráðið varð stovna í 1997 millum Føroyar, Ísland og Grønland. Tá Útnorðurráðið í 2007 hevði 10 ára hátíðarhald, varð samstundis skipað fyri hugskotskapping um hvussu londini í útnorðri kundu knýtast tættari sambond.

Úr Suðuroynni kom uppskot um Útnorðurskúlan, ein skúli, sum skuldi byggjast upp í teimum trimum londunum. Útnorðurráðið tók undir við hesum uppskotinum í 2007 og hevur aftur í 2017 samtykt, at Útnorður skúlin skal setast á stovn.

Í Suðuroynni var tankin frá byrjan, at skúlin skuldi staðsetast í Suðuroynni og eru kommunurnar í Suðuroynni samdar um, at Útnorður skúlin skal staðsetast í Hvalba.

Ein bólkur er settur at arbeiða við fyrireikingunum av Útnorður skúlanum, sum skal skipa skúlan bæði bygnaðarliga og innihaldsliga. Í Hvalba eru hølir tøk til bæði sjálvan skúlan og til næmingabústað, og eru fysisku karmarnir sostatt til taks til at kunna fara ígongd í august 2019.

Verkætlanarbólkurin fer í næstum at kunna bæði kommunurnar í Suðuroynni og Landið um ætlanina, soleiðis at hon kann setast í verk í tráð við tilmælið frá Útnorðurráðnum.

*Kommunurnar í Suðuroynni taka undir við hesari ætlan, sum førir við sær, at fleiri størv til fólk við útbúgving og onnur størv verða við Útnorður skúlan.*



## Tilmælið 6. Halda fast í teimum útbúgvingartilboðum sum eru

Við Skúladepilin í Suðuroy, sum varð tikin í nýtslu á vári 2009, eru tað í dag miðnámsútbúgvingar og útbúgvingar á Heilsuskúla Føroya.

Á miðnámsskúlanum eru skipaðar hugbreyt, náttúrubreyt og búskaparbreyt, umframt at tað ber til at taka FHS yrkisnám við miðnámsskúlan. Búskaparbreytin og FHS yrkisnám eru seinastu árini løgd aftur at útbúgvingartilboðnum á miðnámsskúlanum. Við Heilsuskúla Føroya eru útbúgvingarnar Heilsuhjálpari og Heilsurøktari.

*Kommunurnar í Suðuroynni eru á einum máli um, at tað hevur sera stóran týdning, at útbúgvingartilboðini á Skúladeplinum í Suðuroy eru so fjøltáttaði sum tilber.*

# 7. SUÐUROYGGIN SUM FERÐAVINNUOYGGJ

Kommurnar í Suðuroynni hava í nógv ár havt felags samstarv um ferðavinnuna í m.ø. Suðuroyar Ferðavinnufelag. Seinastu tíðina hava kommunurnar tikið stig til víðkan av hesum samstarvi fyri at menna ferðavinnuna í Suðuroynni.

Suðuroyggin hevur nógvar møguleikar í ferðavinnuhøpi. Fyri ein part eru teir mentir, meðan aðrir møguleikar enn ikki eru serliga sjónligir.

Talið á ferðafólki veksur nógv í Føroyum, eins og føroyingar sjálvir ferðast alt meira í egnum landi. Avbjóðingin hjá Suðuroynni er at fáa fatur á sínum parti av hesum vøkstri og gera ferðavinnu til eina virkna vinnu í økinum. Tí gera kommunurnar nú eina yvirskipaða ætlan, sum í fyrstu atløgu setir nøkur mál fyri hvussu ferðafólk fáast at vísa økinum størri áhuga, og hvussu til ber at tryggja, at tey, sum búgva og virka í oynni, fáa sum mest nyttu og sum minst av óynsktari ávirkan burtur úr hesi í landshøpi nógv vaksandi vinnu.

Endamálið er yvirskipað og ítøkiliga at leggja leiðina til ræettis, sum Suðuroyggin í felag skal fara. At gera eina framtíðarætlan við ítøkiligum átøkum, sum skal fremja og skipa ferðavinnu trygt og skynsamiliga við nýggjum starvsmøguleikum og vinningi fyri tey, sum búgva og virka í økinum. Endamálið er eisini at tryggja støðugar, tryggar og dyggar tænastur til ferðafólk, sum vitja økið.

Tilgongdin er sett upp í stig, har kommunurnar fíggja fyrstu stigini. Seinasta stigið fíggja kommunurnar partvíst saman við fígging uttaneftir. Væntað verður í hesum sambandi, at tað fer at bera til at fáa fíggjarligan stuðul frá skipanum hjá Landinum til menningina av innanlendis ferðavinnuni í Føroyum.

*Kommunurnar eru á einum máli um, at ferðavinnan kann (og eigur at) gerast ein týðandi vinna fyri Suðuroynna, har tað kunnu skapast fleiri størv, nýggjar tænastur og tilboð, fólki og vinnulívi í Suðuroynni og vitjandi at frama.*



## Tilmælið 7. Víkingaskipið

Nógvar spennandi verkætlanir eru ígongd í Suðuroynni, sum kunnu fáa stóra ávirkan á áhugan hjá ferðafólki at vitja Suðuroynna. Nakrar av hesum verkætlanum hava eisini landsáhugað og eru av landsstýrinum raðfestar á Fíggjarlógini.

Ein av hesum verkætlanum er víkingaskipið, sum skal byggjast í Hovi. Talan er um sera spennandi verkætlan, har fyrsta víkingaskipið verður bygt í Føroyum í upprunastødd og eftir tekningum av veruligum víkingaskipi.

Í grannalondum okkara eru slík søgulig skip stór ferðavinnumál, sum draga til sín fólk í stórum tali, og hetta fer uttan iva eisini at verða støðan við víkingaskipinum.

*Kommunurnar í Suðuroynni taka undir við hesari ætlan, sum førir við sær, at fleiri størv og økt virksemi, og heita kommununurnar í felag á Landsstýrið um at gerast ein enn virknari fíggjarligur viðspælari í hesari fyri Suðuroynna og Føroyar stóru verkætlan.*



# 8. FERÐASAMBANDIÐ TIL SUÐUROYAR

Ferðasambandið um Suðuroyarfjørð er lívsæðrin hjá suðuroyingum, bæði tá umrøður at fara til ítróttar-, frítíðar- og skúlatilboð, at ferðast eftir tænastum (t.d. innan heilsuverkið), at ferðast út í heim, og í ávísum førum at ferðast til arbeiðis (tað eru fleiri suðuroyngar, sum vikupendla til arbeiðis norðanfjørðs, tvs. fara norður mánamorgun og suðuraftur tórskvøld ella fríggjadag).

Nógvir suðuroyingar sigla uttanlanda, og hava stóran tørv á, at ferðasamabandi verður skipa soleiðis, at ein kann ferðast sama dag millum flogvøllin og Suðuroynna.

Atgongd til arbeiðsmarknaðin í meginøkinum og til at kunna veita tænastur til stóra marknaðin, bæði almenna og privata, í meginøkinum hevur stóran týdning fyri at skapa menning. Vágatunnilin er helst besta dømi um hetta, tí Vágarnar eru tað økið í landinum, sum hevur vaksið skjótast seinastu árini – høvuðsorsøkin er vegatkoman til meginøkið.

Manglandi atgongd hjá suðuroyingum til arbeiðsmarknaðin og til at veita tænastur í meginøkinum er ein av høvuðsorsøkin til

- at arbeiðsloysið í Suðuroynni hevur verið tvífalt tað, sum arbeiðsloysið er í restina av landinum
- at inntøkurnar hjá fólki í Suðuroynni eru væl lægri enn inntøkurnar hjá fólki í øðrum pørtum av landinum
- at kommunurnar í Suðuroynni hava havt lítlan og ongan inntøkuvøkstur í persónsskatti, tá samanborið verður við kommunur í meginøkinum
- Ikki minst, so hevur manglandi atgongd til arbeiðsmarknaðin í meginøkinum havt sera stóra ávirkan á gongdina í fólkatalinum í Suðuroynni.
- Fólkatalið stendur í løtuni í stað. Lutfalsliga verða tað ár um ár alsamt fleiri eldri í Suðuroynni, samstundis sum barna- og ungdómsárgangirnar minkað.



## Tilmælið 8: Suðuroyartunnilin projekterast

Tá umrøður at skapa framburð og menning, er lítið at ivast í, at nýtt ferðasamband um Suðuroyarfjørð, **Suðuroyartunnilin**, er ein hin týdningarmesta íløgan fyri at skapa framburð og menning í Suðuroynni.

Tá Sandoyartunnilin er liðugur í 2022, er Suðuroyggin einasta stóra økið í landinum, sum ikki hevur fast samband til meginøkið. Øll verkætlanin kring Suðuroyartunnilin má tí verða projekterað og klár at seta ígongd í 2022, tá Sandoyartunnilin er liðugur. Tað vil siga, at bæði linjuføring, allar neyðugu kanningar av hvør linjuføring er best, og sjálvur fíggingarleisturin má verða púra greiður í góðari tíð áðrenn 2022. Sum framhald av Sandoyartunnlinum má sjálvsagt borast tunnil til Suðuroyar.

*Kommunurnar í Suðuroynni eru samdar um, at Suðuroyartunnilin er ein alneyðug íløga í framtíðina í Suðuroynni og mæla Landinum til at seta gongd á verkætlanina beinanvegin.*



## Tilmælið 9: Smyril og Suðuroyarleiðin

Kommunurnar í Suðuroynni eru á einum máli um, at tað hevur alstóran týdning, at so longi farleiðin um Suðuroyarfjørð verður røkt av Smyrli, eigur dentur at verða lagdur á, at tænastan við Smyrli er so góð sum tilber og til frama fyri suðuroyingar.

Ferðaætlanin hjá Smyrli eigur til eina og hvørja tíð at verða laga til tørvin hjá suðuroyingum, har hædd eisini verður tikin fyri fráferðartíðum, títtleika og ferðakostnaðinum.

Umframt at verða ein tænasta til fólk, vinnu og stovnar í Suðuroynni, so er farleiðin um Suðuroyarfjørð eisini ein týðandi partur av ferðavinnumøguleikunum í Suðuroynni. Hesi viðurskifti eiga eisini at verða tikin hædd fyri, tá farleiðin um Suðuroyarfjørð verður skipað.

*Kommunurnar í Suðuroynni fara at kalla inn til fund saman við Strandfaraskipum Landsins, Samferðslumálaráðnum, og umboðum fyri vinnulívið í Suðuroynni har eftirmeting og endurskoðan av Suðuroyarleiðini er á skrá.*

## Tilmælið 10: Økja um tyrluflúgvingina

Atkoma, ferðatíð og títtleiki eru lyklaorð tá talan er um at ferðast frá einum staði avskornum staði til eitt meginøkið. So longi Suðuroyarleiðin verður røkt av Smyrli, so er ferðatíðin ávísa longd, samstundis sum títtleikin er avmarkaður av bæði ferðatíð og hvílitíð hjá manning. Hetta hevur ávirkan á hvussu ofta og skjótt tað ber til at sleppa úr Suðuroynni til miðstaðarøkið.

Umframt Smyril, so er eisini tyrluflúgvin til og úr Suðuroynni tveir dagar um vikuna, ónsdag og fríggjadag, men tykist ferðaætlanin í lítlan mun verða hugsa sum ein tænasta til suðuroyingar.

*Mælt verður til, at kommunurnar í Suðuroynni saman við Atlantic Airways fara undir at kanna hvussu tyrluflúgvingin til Suðuroyar kann skipast betri og við fleiri fráferðum fráferðum millum Suðuroynna – Havnina - Flogvøllin.*

Ynskið er, at umstøðunar hjá tyrluni vera gjørdar soleiðis, at fyrsta alternativi at seta seg, í samband við rutuflúgving til og úr Suðuroynni, verður á Krambatanga. Hetta vildi gjørt tað møguligt, at samskipa tyrluferðina til og frá Suðuroynni við siglingina hjá Smyrli, havandi í huga at á Krambatanga koyra bussar, eins og bilarnar hjá teimum ferðandi standa parkeraðir.



## Tilmælið 11: Taka uppaftur sigling til Skotlands

Í 1980- og 1990árunum var í eitt áramál siglt millum Suðuroynna og Skotlands. Gamli Smyril røkti hesa farleiðina, meðan gamli Teistin røkti Suðuroyarleiðina.

Hendan farleið var ein týðandi farleið fyri vinnulívið í Suðuroynni, bæði í samband við útflutning av fiskavørum, og í samband við innflutning av handilsvørum til handilslívið í Suðuroynni. Fasta ferðasambandið til Skotlands var eisini ein nógv brúkt leið hjá ferðafólki, sum valdu Skotland og Stóra Bretland sum ferðamál.

Lítið er at ivast í, at hendan leiðin framvegis er ein sera áhugaverd leið hjá vinnulívinum í Suðuroynni, bæði hjá útflutningsvinnuni og í samband við innflutning av vørum úr Stóra Bretlandi.

Í ferðavinnuhøpi er farleiðin millum Skotland og Suðuroynna/Føroyar eisini sera áhugaverd. Føroyar hava sum ferðavinnuland gjørt risa lop síðani miðskeiðis í 1990unum, eru farin frá at verða eitt "ókent" land í Norðuratlantshavi til at verða eitt sera áhugavert ferðamál.

Fyri ferðavinnuna í Suðuroynni (og í Føroyum sum heild) hevði ferðafólkasigling millum Skotland og Føroyar verða eitt týðandi frambrot, sum hevði ført við sær nýggjar møguleikar fyri at menna ferðavinnuna í Suðuroynni (og í Føroyum).

Tað tekur 10-12 tímar at sigla úr Suðuroynni til Scrabster í Skotlandi, so talan er um lutfalsliga stutta farleið.

*Kommunurnar eru á einum máli um, at farast skal undir at kanna møguleikarnir fyri at taka uppaftur sigling millum Suðuroynna og Skotland. Mælt verður til at tað beinanvegin verður kalla inn til felags fund millum Samferðslumálaráðið, Strandfaraskip Landsins og kommunurnar í Suðuroynni um Skotlands-leiðina.*



# 9. VINNUMENNING og KARMAR

At skapa framburð og menning, fleiri størv, tilboð og tænastur í Suðuroynni er ikki bara ein spurningurin um almennan (land og kommunur) leiklut. Vinnulívið má eisini verða ein partur av at skapa menning í Suðuroynni – og verður leikluturin hjá landi og kommunum tá at skapa karmar.

Fleiri ítøkiligur møguleikar eru fyri vinnuligari menning í Suðuroynni. Ferðavinnuna hava kommunurnar í felag sett ovarliga á breddan og er lítið at ivast í, at stórir møguleikar eru innan ferðavinnuna. Raðfestingin av ferðavinnuni er og fer framvegis at verða í tøttum samstarvi millum land, kommunur og vinnuligar aktørar í Suðuroynni. Kommunurnar hava stórar vónir til at nýggj størv, nýggj tilboð og nýggjar tænastur næstu tíðina fara at verða skaptar innan ferðavinnuna í Suðuroynni.

Umframt ferðavinnuna, so eru tað eisini aðrar vinnur í Suðuroynni, sum hava stórar møguleikar fyri at skunda undir menning og framburð.



Alivinnan í Suðuroynni hevur síðani í juli 2016 verið í einari bíðustøðu, tí tveir av firðunum eru uttan alara. Hendan støðan er ikki haldbar og er ein beinleiðis forðing fyri øktum virksemi innan alivinnuna í Suðuroynni. Nú nýggja alilógin er samtykt í Løgtinginum eigur avgreiðsla av loyvunum á Hovs- og Hvalbiarfirði at fáa størstu raðfesting í Landsstýrinum.

Við nýggjum fiskivinnulóggávuni er nýggjur táttur komin inn í umsitingin av tilfeinginum í havinum – *menningarkvotur*. Grundhugsanin í menningarkvotunum er, at tær skulu brúkast sum eitt amboð at skunda undir menning í økjum, sum eru merkt av minkandi fólkatali, arbeiðs- og vinnuloysi og víkjandi inntøkum. Menningarkvoturnar kunnu gerast ein týðandi møguleiki fyri at skapa menning í Suðuroynni. Greitt er eisini, at Suðuroyggin (tíverri) livir upp til allar ásetingar í kunngerðini um menningarkvotur. *Kommunurnar í Suðuroynni eru á einum máli um, at landsstýrið eigur at virka fyri, at Suðuroyggin fær so stóran lut í menningarkvotunum sum tilber.*

Á vinnuliga økinum eru tað eisini fleiri aðrir tættir, sum hava stóran týdning fyri Suðuroynna, til dømis fiskaflutningur til og úr oynni, eftir at Farmaleiðir hjá SSL var niðurløgd. Ferðavinnan hevur eisini avbjóðingar orsaka av manglandi títtleika, manglandi bíleggingar skipan hjá SSL, fyri at nevna nøkur dømi.

Hesi og onnur viðurskifti fara kommunurnar at taka upp saman við vinnulívinum í oynni og verður skrivað eitt ískoytið til hetta upprit um hesi viðurskifti.

# 10. ONNUR VIÐURSKIFTI

Kommunurnar hava eisini á felags fundum viðgjørt fleiri onnur viðurskifti og evni, sum hava týdning fyri Suðuroynna. Nøkur viðurskifti og evnir eru ikki liðugt viðgjørd enn, meðan onnur átroðkandi mál eru tikin upp, men eru ikki endaði ella avgreidd enn.

## Umstøðurnar hjá barnakonum

Millum átroðkandi málini, sum eru tikin upp, eru umstøðurnar hjá barnakonum í Suðuroynni.

Eftir at føðideildin á Suðuroyar sjúkrahúsi lat aftur 1. januar 2016, vísur heilsufrøðingurin í Suðuroynni á, at vit hava fingið enn fleiri avbjóðingar í Suðuroynni, tí hetta viðkvæma økið er so grundleggjandi fyri menning og trivnað í Suðuroynni.

Í dag er skipanin tann, at allar barnakonur skulu eiga á Landssjúkrahúsinum í Havn. Hetta førir við sær, at barnakonurnar við familju mugu verða í Havn í dagar og vikur uppundir og eftir føðing.

Hetta snýr seg ikki bert um at koma til Havnar at gista í dagar ella vikur uppundir føðing og at betra um umstøðurnar, um tørvur er á tí. Hetta snýr seg um so ómetaliga nógv meira, sum ikki á nakran hátt kann mátast.

Hetta snýr seg um millum annað um nógva stúran og neiligar tankar í allari viðgongutíðini. Hetta hevur helst eisini ført við sær, at kvinnar í Suðuroynni velja frá at fáa sær fleiri børn.

Barnakonur greiða frá hvussu tær eru ávirkaðar:

*"Sjálv havi eg verið SERA ávirkað av tonkunum um at skula norðureftir í fleiri dagar, áðrenn termin. Tankin um at skula norðureftir við sjeiki og barni. Leggja feriu hjá teimum soleiðis til rættis at skula norðureftir 14 dagar, áðrenn termin og møguliga 14 dagar eftir termin.*

*Eg veit við mær sjálvari, at so leingi umstøðurnar og treytirnar eru sum nú, so fái eg mær ikki fleiri børn. Eg vil vera heima hjá mær sjálvari, inntil eg skal eiga. Har klári eg best at slappa av og njóta tíðina, sum er eftir og at gera klárt til barnið kemur. Tað fái eg ikki gjørt aðrastaðni enn heima hjá mær sjálvari".*

***

*"Sjálvandi skulu suðuroyðingar ikki missa inntøku í x-antal vikur bara fyri at gerast foreldur. Tað skulu aðrir føroyingar ikki, hví skulu suðuroyningar so tað? Gjalda okur kanska ikki tann saman skattin sum restin av Føroyum? Ei heldur skulu suðuroyingar brúka sína feriu uppá at ganga í Havna og mala. Eg eri bangin fyri, at politikarar eru ikki klárir yvir, hvussu alvorlig støðan er. Kanska tí, at summi vilja vera við, at tað er grenj? Tað er ikki grenj.*

*Ein barnakona skal ikki stúra, og tað gera allar barnakonur úr Suðuroynni. Tær stúra um bústað í Havn, um mista inntøku hjá húsarhaldinum, um ansing av børnum o.s.fr.*

*Sjálvsagt má trygdin vera í lagi; eg ivist bara í, um tað er serliga trygt at stressa eina barnakonu."*

Eitt ávíst samskifti hevur verið við Heilsumálaráðið um málið, sum tó ikki er endað enn.

# 11. AT ENDA

Sum nevnt í byrjanini, so er hetta uppritið eitt upprit frá ávegis arbeiðinum frá fundum millum kommunustýrini í Suðuroynni, har nøkur av átøkunum, sum mælt verður til, eru greinaði.

Tilmælini eru grundaði á royndinar frá øðrum útjaðarøkjum, sum hava megnað at skapt menning, har royndirnar staðfesta, at menning og framburður eru tengd at:

- einum fjøltáttaðum arbeiðsmarknaði við ymiskum sløgum av arbeiðsplássum og arbeiðsmøguleikum, og ikki minst arbeiðsmøguleikum hjá fólki við útbúgving
- atgongd til góðar trivnaðartænastur og -tilboð í nærumhvørvinum, bæði av almennum og privatum slagi, og til allar aldursbólkar
- atgongd til spennandi og mennandi mentanartilboð í nærumhvørvinum
- atgongd til spennandi og mennandi útbúgvingartilboð í nærumhvørvinum
- góð atgongd til meginøkið hevur eisini stóran týdning, ikki minst í tann mun, at atgongdin er tengd at atgongd til góðan arbeiðsmarknað

Uppritið er ein ávegis frágreiðing, men arbeiðið steðgar tó ikki her. Kommunurnar í Suðuroynni koma tó framhaldandi at arbeiða við menningarátøkum í Suðuroynni, har arbeitt verður við teimum átøkunum, sum eru nevnd í uppritinum og øðrum viðurskiftum og átøkum, sum hava til endamáls at skapa framburð og menning í Suðuroynni.

Við uppritinum **SUÐUROYGGIN OG FRAMTÍÐIN – TILMÆLIÐ UM MENNINGARÁTØK 2018** – hava kommunurnar í Suðuroynni gjørt eitt íkast til arbeiðið við menning í Suðuroynni og hava samstundis eisin givið Landsstýrinum høvið til at verða ein virkin viðspælari í at skapa menning í hesum partinum av landinum.

